Løgtingið - Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

7. juni 2018
**Mál**: 18/00564-4
**Tygara Skriv**:

# Fíggjarnevndarskjal

## a. Inngangur

Landstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum søkir við hesum Løgtingsins Fíggjarnevnd um 10 mió. kr. í eykajáttan til høvuðskontu 11.20.3.04 Landssjúkrahúsið *(Rakstrarjáttan)*, orsakað av, at játtanin til Landssjúkrahúsið er ov lág til verandi virksemi.

## b. Málsfrágreiðing

Játtanin til Landssjúkrahúsið ov tepur til at halda verandi virksemi.

Landssjúkrahúsið hevur sagt frá, at tørvur er á góðum 14 mió. kr. fyri at røkka at hava sama virksemi, sum í 2017. Harumframt hevur sjúkrahúsið nú fingið 7 mió. kr. í rokning frá Region Hovedstaden fyri reglurering vegna Viðgerð uttanlands fyri 2016 og 2017, sum verður bókað í 2018.

Hetta merkir, at 21 mió. kr. vanta í til at fáa játtanina í 2018 at hanga saman.

| Orsøkirnar eru í høvusheitum hesar: | Upphædd: |
|---|---|
| Hægri lønarútreiðslur vegna lønarsáttmálar | 4 mió. kr. |
| Konsulentar v.m. | 10 mió. kr. |
| Serviðgerð uttanlands | 7 mió. kr. |
| **Íalt** | **21 mió. kr.** |

Tiltøk eru sett í verk soleiðis, at nøkur umsitingarlig størv ikki verða sett aftur, eins og aðrar sparingar og tillagingar eru settar í verk. Eftir at hesi tiltøk eru sett í verk vanta 10 mió. kr. í til vanliga virksemið. Tað verður arbeitt við samstarvi ímillum sjúkrahúsini fyri áhaldandi at gagnnýta tilfeingi í Føroyum betur innan verandi karmar. Hetta bæði fyri at veita eina enn dygdarbetri heilsutænastu og fyri at tálma útreiðsluvøkstri.

Viðvíkjandi Virksemi uttanlands vanta 7 mió. kr. í, og eru tiltøk sett í verk fyri at avmarka talið av sjúklingum, sum verða sendir uttanlands. Ilt er at siga, hvussu hetta kemur at ávirka fíggjarligu gongdini, og í besta fall ber til at vóna, at játtanin kemur at halda. Sigast skal, at tað í løtuni er trupult at stýra virkseminum uttanlands, av tí at Región Hovedstaden í 2016 hevur tikið nýggja Sundhedsplatformin í nýtslu og hevur ikki kunnað sent rættar rokningar

síðani tá. Fyrstu rokningar síðani oktober 2016 vórðu móttiknar í oktober 2017. Enn er eingin rokning móttikin fyri 2018.

Av tiltøkunum, ið eru sett í verk fyri virksemi uttanlands verða tó einans viðgerðir útsettar, har vandi ikki er fyri førleika ella lívi. Sparingarnar væntast at verða millum 3 og 7 mió. kr.

Tiltøk, í sjúkrahúsinum og tálmingar av uttanlandsvirkseminum, sum eru sett í verk, standa við.

Biðið verður um, at játtanin til Landssjúkrahúsið í 2018 verður hækkað við 10 mió. kr. til vanliga virksemi.

### 11.20.3.04. Landssjúkrahúsið *(Rakstrarjáttan)*

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 665.525 | 10.000 | 675.525 |
| Útreiðslur | 715.000 | 10.000 | 725.000 |
| Inntøkur | 49.475 | - | 49.475 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðsla | 474.019 | 10.000 | 484.019 |
| **Útreiðslur** | **500.219** | **10.000** | **510.219** |
| 11. Lønir v.m. | 381.844 | 5.000 | 386.844 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 111.320 | 5.000 | 116.320 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6.705 | - | 6.705 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 100 | - | 100 |
| 19. Ymsar rakstrarúteiðslur | 250 | - | 250 |
| **Inntøkur** | **26.200** | **-** | **26.200** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *26.000* | *-* | *26.000* |
| *29. Ymsar rakstrarútreiðslur* | *200* | *-* | *200* |
| **22. Viðgerð uttanlands - Landssjúkrahúsið** | | | |
| Nettoútreiðsla | 108.451 | - | 108.451 |
| **Útreiðslur** | **117.051** | **-** | **117.051** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 117.051 | | 117.051 |
| **Inntøkur** | **8.600** | **-** | **8.600** |
| *65. Flytingar úr Danmark* | *8.600* | *-* | *8.600* |
| **23. Viðgerð uttanlands – Klaksvíkar sjúkrahús** | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.816 | **-** | 9.816 |
| **Útreiðslur** | **9.816** | **-** | **9.816** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 9.816 | | 9.816 |
| **24. Viðgerð uttanlands – Suðuroyar sjúkrahús** | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.536 | **-** | 3.400 |
| **Útreiðslur** | **3.536** | **-** | **3.536** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.536 | **-** | 3.536 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **25. Flutningur og uppihald** | | | |
| Nettoútreiðsla | 24.330 | - | 24.330 |
| **Útreiðslur** | **24.330** | - | **24.330** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 24.330 | - | 24.330 |
| **26. Sjúklingahotellið Tórshavn** | | | |
| Nettoútreiðsla | 20.422 | - | 20.422 |
| **Útreiðslur** | **22.261** | - | **22.261** |
| 11. Lønir v.m. | 10.912 | - | 10.912 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.999 | - | 4.999 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 55 | - | 55 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 6.295 | - | 6.295 |
| **Inntøkur** | **1.839** | - | **1.839** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *1.839* | - | *1.839* |
| **27. KT-øki heilsuverksins** | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.351 | - | 7.351 |
| **Útreiðslur** | **7.787** | - | **7.787** |
| 11. Lønir v.m. | 4.238 | - | 4.238 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.239 | - | 3.239 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 70 | - | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 240 | - | 240 |
| **Inntøkur** | **436** | | **436** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *436* | - | *436* |
| **28. Avseting til serlæknar** | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.000 | - | 5.000 |
| **Útreiðslur** | **5.000** | - | **5.000** |
| 11. Lønir v.m. | 5.000 | - | 5.000 |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)** | | | |
| Nettoútreiðsla | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **12.400** | - | **12.400** |
| 11. Lønir v.m. | 5.700 | - | 5.700 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.500 | - | 3.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 500 | - | 500 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.700 | - | 2.700 |
| **Inntøkur** | **12.400** | - | **12.400** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *12.400* | - | *12.400* |

## c. Grundgeving fyri framløgu

Málið hevur skund, tí Landssjúkrahúsið fyri at halda játtan, má seta fleiri tiltøk í verk, enn ráðiligt er.

**d. Uppskotið**
Vísandi til omanfyristandandi, verður søkt um eykajáttan á 10 mió. kr. til høvuðskontu 11.20.3.04. Landssjúkrahúsið *(Rakstrarjáttan)*, soleiðis at á eykafíggjarlógini verður tikið við:

## § 11 Heilsu- og innlendismál

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| **11.20.3.** | **Sjúkrahúsverkið v.m.** | | | |
| 04. | Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan) | J | 665.525 | - |
| | | **EYJ** | **10.000** | **-** |

## e. Tilsøgn frá Fíggjarmálaráðnum

Fíggjarmálaráðið hevur givið tilsøgn um, at umsóknin verður send Løgtingsins Fíggjarnevnd, tí at málið hevur skund.

**Váttað:**

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ Bjarni A. Bjarnason
aðalstjóri

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Turid Arge
aðalstjóri